Lýsingartorgið

Lýsingatreytir fyri ókeypis lýsingar:
✓ privatar lýsingar
✓ í mesta lagi 40 orð
✓ bert ein lutur í hvørjari lýsing
✓ hægsta søluvirði 20.000 kr.

Lýsingar, gjaldast skal fyri:
Vanl. lýsingaprísur:
✓ frá fyritøkum og virkjum
✓ fleiri enn 40 orð
✓ søluvirði oman fyri 20.000 kr.

tó minst 50,- kr. + MVG hvørja ferð:
Lýsingar, gjaldast skal fyri:
50,- kr. + MVG hvørja ferð:
✓ lýsingar undir teigunum: »Dansur«, »Fundir« og »Matur«
✓ Bill. merktar

Akfør

CITROEN AX GT
Ein hvítur lítil ax´ari við nógvari eykaútgerð, bíliga til sølu. Bilurin er í góðum standi. Hevur koyrt 122.000 km. árg. 88
Bárður Poulsen
Mýrisnípuvegur 3
100 Tórshavn
tlf. 251221 eftir kl. 17.00

CITROEN SAXO
1.5 diesel, sera økonomiskur, árg. 98 til sølu.
Tlf. 218061, 448061, 441888

CITROEN SAXO 1.1 i
árg. 6/96, koyrt 61.500 km í góðum standi til sølu fyri 65.000 kr.
Tlf. 456272

CITROEN XANTIA 1.9
turbo diesel, árg. 95, til sølu, koyrt 150.000 km + eyka sett av felgum.
Tlf. 448055 ella 222548

CITROEN ZX 1.8i
Aura, grønur, el-rútar, ABS-bremsur og sportsfelgur, árg. 95, koyrt 60.000 km, gott stereoanlegg kann fylgja við.
Tlf. 314949

COROLLA TIL SØLU
Ein Toyota Corolla er til sølu fyri 5.000,- kr. Í góðum standi og 4 píkadekk á felgum fylgja við.
Ring á tlf. 220800 ella 455696, Ólavur

DAIHATSU CHARADE
frá des. 86, til sølu. Sýnaður 1. juni 2000. Prísuppskot 7.000 kr.
Tlf. 319808

DEKK/FELGUR
4 stk. 13" felgur v/ summardekkum (145-R13) til sølu fyri 1.000 kr. Passa til t.d. Ford Fiesta.
Tlf. 316114

DIESELMOTORUR
Mazda dieselmotorur E 2200 til sølu.
Tlf. 317713
ella 283138

FORD ESCORT
árg. 1989, til sølu fyri 5.000 kr.
Tlf. 213883

FORD ESCORT
1.6, 16 V, árg. 95, koyrt einans 64.000 km, sær út sum nýggjur, til sølu um høskandi boð fæst.
Tlf. 371280
ella 317163

FORD ESCORT 1,3 GL
árg. 12/95, sýnaðurí mai 2000, koyrt 81.000 km, til sølu.
Tlf. 316814
ella 317565

FORD FIESTA
árg. 86, vælhøskandi til eykalutir, bíliga til sølu.
Tlf. 315921

FORD SIERRA
Ein Ford Sierra 1600, árg. 88, í góðum standi, sýnaður í 1999 til sølu.
Tlf. 421488

GRULVIGARÐUR YNSKIST
Grulvigarður, har botnurin kann regulerast, ynskist til keypst.
Tlf. 321134

KIA SEPHIA 1.5
sedan, 2 ára gamal, koyrt 23.000 km, sera vælhildin, til sølu fyri kr. 90.000,-
Tlf. 313865

LEIGA
ein bil ella ein buss til 10 ferðandi uttan fórara.
Tlf. 317865 - 282165

LÍTIL FITTUR BILUR TIL SØLU
Renault Clio 1.2, árg. 1995, einans koyrt 64.000 km, sýnaður í mars í ár, fekk ongan kross. Ring og fá meiri at vita á
tlf. 422183

LYKTIR
til Daihatsu Charmant til sølu. Vinstra forlykt og báðar baklyktirnar til sølu.
Tlf. 217322

MAZDA 323
Árg. 97, til sølu við skaða. Nærri fæst at vita á
Tlf. 220294

MAZDA 323
Til Mazda 323 árg. 10/86 eru baklyktir og kúfangari aftan til sølu.
Tlf. 449455

MAZDA 323 16 GRI
til sølu sum eykalutir. Vínreyður og sær gott út. Prísur 5.000 kr.
Tlf. 217640, e. kl. 19

MAZDA 626
2.0 diesel, árg. 87, koyrt 163.000 km, sýnsgóðkendur 9.5.2000.
Tlf. 313824 ella 222241.
Best eftir kl. 18

MAZDA 626 2.0
Nýumvældur fyri 15.000 kr., nýsýnaður. Spildurnýggj breið dekk á alu sportsfelgum + 4 nýggj píkadekk og gott Sony disk-stereoanlegg við radio. Bilurin er altið sera væl viðfarin, til sølu vegna flyting fyri kr. 25.000.
Tlf. 210730 Heini

MERCEDES
280 SE til sølu.
Tlf. 421093

MERCEDES 280 SE
árg. 84, autom. gear, 190 HK, aircondition, el-rútar, sentrallás v.m., bíliga til sølu. Hevur plátur og koyrir sera væl.
Tlf. 221021

NISSAN ALMERA
Bláur Nissan Almera 1,4 GX árg 96, til sølu. Prísuppskot 100.000 Kr.
Tlf. 448356 - 218356

NISSAN ALMERA
Bláur Nissan Almera 1,4 GX árg 96, til sølu. Prísuppskot 100.000 Kr.
Tlf. 448356 - 218356

NISSAN BLUEBIRD 2.0
LX, árg. 87, krevur ábøtur til sølu.
Tlf. 424289

NISSAN BLUEBIRD T 12
árg. 88, hevur sportsfelgur, fýra nýggj heilársdekk á felgum og nýtt stereoanlegg.
Tlf. 217151

NISSAN MICRA
árg. 89, við fimm hurðum, automatisk gearum, 4 píkadekkum á felgum og 4 summardekkum. Sýnaður í des. 99. Prísuppskot 20.000 kr.
Tlf. 213967

NISSAN SUNNY
árg. 1986. Vælhóskandi til eykalutir, bíliga til sølu.
Tlf. 315921

NISSAN SUNNY B 12
1.6 SGX, árg. 09/86, sýnaður í mars 2000, til sølu fyri 12.500 kr.
Tlf. 444470 eftir kl. 12

NÓGVIR EYKALUTIR
til PAJERO til sølu. M.a. Bakhurð, nýggjur forskermur, »Kengurufangari«, hjelmur, powerstýring, spegl. o.a.
Tlf. 217322

OPEL ASTRA TD
árg. 12/96, koyrt 79.000 km við heilt nýggjum sportfelgum og dekkum til sølu fyri uml. 115.000 kr.
Tlf. 318804/444120

OPEL CORSA
Typa 9, árg. 86, hevur plátur, skal til umsýn, til sølu fyri 6.000,-, ella eitt boð.
Tlf. 314425

OPEL KADETT
Opel Kadett, árg. 87, aut.gear, til sølu.
Tlf. 314471

OPEL KADETT
st. árg. 87, bíliga til sølu.
Tlf. 320561
ella 251075

OPEL VECTRA
diesel 92, Hyundai Elentra 92, Toyota Hiachi 12 sitiplass 88, Ford Fiesta 90, Opel Kadett 89, til sølu. Allir í góðum standi.
Tlf. 317865
ella 282165

PEUGEOT 306
1.9 Turbo diesel, árg. 96, koyrt 122.000 km, í góðum standi til sølu.
Tlf. 213577

SEAT CORDOBA 1.9
st.car, diesel (líkist VW Polo), 5 hurðar, km. 7.800 árg.: 26.08.99, . Til sølu vegna keyp av størri bili. Koyrir uml. 800 km fyri 150,00 kr. Prísur: 128.000,00. Størri bilur kann møguliga takast í býti.
Tlf. 449613 ella 217200
(yrkadagar eftir kl. 18)

SLEIPIKRÓKUR
til Suzuki o.a. við káplum, nýggjur, ongantíð brúktur, bíliga til sølu.
Tlf. 217946

SUZUKI ALTO 1,00 GL
til sølu. Hevur koyrt uml. 24.000 km og er frá 25.08.98. Prísur uml. 65.000 kr.
Tlf. 317298 - 282098

SUZUKI SWIFT 1.3 GTI
uttan plátir. Hevur smærri brek, til sølu fyri hægstbjóðandi.
Tlf. 217747

TIL GOLF II
Setur framman og aftan, 500 kr. Óbrúktur hondbremsukápil, 150 kr. Fýra 13" summardekk, 500 kr.
Tlf. 422335 - 225124

TIL SØLU
Peugeot 309 GLX 1.6, árg. 99, í sera góðum standi, til sølu um høskandi boð fæst.
Tlf. 222550 ella 222711

TIL SØLU
Mitsubishi Pajero, árg. 88, 7 setur, el-rútar, sentrallás, í góðum standi, til sølu.
Tlf. 444619 ella 220946

TIL SØLU
Gráur Peugeot 205 automatic frá '89 til sølu fyri 12.000. Krevur smærri ábøtur.
Ringið 455712 ella
217712

TIL SØLU
Nissan Sunny, árg. 86, koyrt 138.000 km, til sølu fyri 15.000 kr.
Tlf. 310318

TIL SØLU
til Mazda 323 árg. okt. 86 eru baklyktir og kúfangari aftan.
Tlf. 449455

TIL SØLU
Tveir B30 170 HK bensinmotorar til sølu fyri 6.000,-
Tlf. 311898

TIL SØLU
Mazda 929 2,2l, árg. 88, aut. gear, el-rútar, sóltak, leðursetur, sær gott út.
Tlf. 214744

TIL SØLU
1 ára gamal Galloper jeepur til sølu (7 pers.).
Tlf. 424513 - 220421

TIL SØLU
Lutir til BMW 528i, 1984: Fýra felgur 6Jx14.H2, fýra skálir 14" rustfrítt stál, og fýra kava/rally toyo dekk, 195/70 SR 14.
Tlf. 316720 - 216720

TIL SØLU
Diesel motorur til VW Golf, árg. 82, í góðum standi, til sølu fyri 3.000 kr.
Tlf. 311898

TIL SØLU
Sera góður og vælhildin diesel motorur til Toyota Corolla, koyrt uml. 150.000 km, til sølu. Prísuppskot 4.000 kr.
Tlf. 215456

TOPPSTYKKI
Til Nissan Sunny-Diesel, árg 89 seilst bíliga
Tlf.317376

TOYOTA
Hilux 2.4 diesel til sølu.
Tlf. 421093

TOYOTA CAMRY
1.8 DX árg. 84, 5 hurðar, koyra sera væl, men er rustaður. Bíliga til sølu.
Tlf. 221026

TOYOTA CAMRY 2.0 GLi
árg. 86, í góðum standi, sýnaður 12/99, til sølu fyri 16.500 kr.
Tlf. 217192

TOYOTA CARINA 2.0i
árg. okt. 92, til sølu fyri 40.000 kr.
Tlf. 314463

TOYOTA COROLLA
Ein Toyota Corolla hatchback, hevur alu-felgur.
Tlf. 218061, 448061, 441888

TOYOTA COROLLA 1,6
5 h, er nýsýnaður, til sølu fyri 15.000 kr.
Tlf. 218778

TOYOTA COROLLA 1.6
árg. 1999 til sølu. Bilurin er senkaður og hevur 17" sportfelgur og sær gott út, hevur koyrt 13000 km. Bilurin er hvítu ro ghevur 2 hurðar.
Tlf. 212560

TOYOTA COROLLA 2.0
diesel, st.car. árg. 10/96, koyrt 104.000 km.
Tlf. 441323 ella 287323

TOYOTA HiAce
árg. 1987, við bensinmotori til sølu, er í góðum standi.
Tlf. 213259 Torfinn

VIÐFESTISVOGNUR
ynskist til keyps. Skal lasta 500 kg ella meira.
Tlf. 213259

VOLVO 240 TIL SØLU
Nýsýnaður, hevur krók og fýra nýggj píkadekk. Prísur 10.000 kr.
Tlf. 221836

VOLVO 244 GL
árg. 79 og nógvir eykalutir, sum gearkassar, toppstykki og annað fylgja við, til sølu fyri 3.000 kr.
Tlf. 421022

VOLVO 340
Ein reyður Volvo 340, árg. 87, bíliga til sølu.
Tlf. 219161

YNSKIST
Ein motorur til ein vw transportara árg. 91. 2.4 diesel (við ella uttan turbo), ynskist til keyps skjótast gjørligt.
Tlf. 210398 ella 320545

YNSKIST
Hevur tú ein Opel Ascona standandi við ella uttan plátum, har motorurin er í ordan, og tú vildi sloppið tær av við hann, so ring á tlf. 210398 ella 320545

Amboð

GOMUL BLANDIMASKINA
til sølu. Tekur heilan sekk.
Tlf. 314384 ella 220425

SLÁIMASKINA
til sølu.
Tlf. 441614

ÚTLEIGAN AV ENTREPRENØRMASKINUM
Bob Cat 751 lessi/gravmaskinur.
Atlas Copco luftkompressarar.
Frættið nærri hjá:
Kaj Andreasen & Co.
Tlf. 315600

Lýsingartekstur

Lýsingin ynskist: 1 2 3 4 5 ferðir *(set X)*
undir teiginum:

❑ Akfør	❑ Amboð	❑ Arbeiði
❑ Barnaansing	❑ Barnaútgerð	❑ Bátaútgerð
❑ Bingo	❑ Brævaskifti	❑ Burturm./funnið
❑ Býli	❑ Bøkur	❑ Dansur
❑ Dýr	❑ Fundir	❑ Húsarhaldstól
❑ Innbúgv	❑ Lutaseðlar	❑ Leikur
❑ Matur	❑ Pløgg	❑ Samband
❑ Súklur	❑ Teldur	❑ Tónleikur
❑ Út- & sjónvarp	❑ Ymiskt	❑ ……

Lýsingarnar skulu vera okkum í hendi innan kl. 12.00. T.v.s. at lýsing til leygardagsblaðið skal vera okkum í hendi hósdag á middegi

Sent hevur:

Navn: ……

Bústaður: ……

Bygd/býur: ……

Tlf.: ……

»Lýsingartorgið«
Tíðindabaðið
Sosialurin
Box 76,
110 Tórshavn

Til frímerki

YNSKIST
Agria 300 ynskist sum eykalutir.
Tlf. 451139

Arbeiði

Á BÓNDAGARÐ Í ÍSLANDI
Fólk søkist at arbeiða í fjósi, 108 km frá Reykjavík.
Tlf. 00354 4351255 ella
8989254

ALLUR GREVSTUR
Alt arbeiði við mini gravmaskinu verður gjørt, t.d. havar o.a.
Tlf. 217691

ALLUR GREVSTUR
verður gjørdur við mini gravmaskinu, t.d. tún, havar og mangt annað.
Tlf. 421643, 211643
ella 282643

ALT ARBEIÐI
innan VATN - HITA - SANITET verður gjørt av roynd-um fólki.
T-RØR
Tlf. 221241
og 319782

ARBEIÐI YNSKIST
30 ára gamal maður søkir arbeiði hjá føryskum málarameistara, ið arbeiðir í Danmark.
Tlf. 321026

AU-PAIR Í ÍSLANDI
Genta, eldri enn 18 ár, ynskist til Hornafjarðar frá og við 15. sept. at ansa eftir 6 ára gomlum dreingi og 13 ára gamlari gentu + lætt húsarbeiði. Arbeiðstíðin er frá kl. 14.00 og viðkomandi kundi havt annað arbeiði fyrrapartin. Meira at vita hjá Tóru (Tórshavn) tlf. 320278 og 223368 og hjá Soffíu (Hornafjørður) tlf. (00298) 861 8433.

FA. HÚSAUMVÆLING: TIMBURARBEIÐI
Alt timburarbeiði verður gjørt.
Tlf. 215214

FAMILIE I DANMARK
søger ung pige - hurtigt! Vi er en familie på fire, Dorthe (31) jordemoder, Mads (34) lærer, Jeppe (3) går i børnehave og Aksel på 8 mdr. Vi søger en pige som kunne tænke sig at komme og bo hos os og passe børnene og hente og bringe i børnehaven. Dine arbejdstider vil være skiftende pga. Dorthes arbejdstider og der vil være mulighed for enkelte fridage, udover weekenderne; og del og der også være behov for at du kan passe børnene en enkelt aften. Ring til os snarest!!!
Vi har tlf. nr.
0045 86888630

HEY
eg er eri ein 14 ára gomul genta, sum søkir arbeiði, um tit hava nakað arbeiði til mín so
Ring: 315634 ella send e m @ i l
susdan@post.olivant.fo

ÍSLAND Á BÓNDAGARÐ
Fólk ynskist at arbeiða í fjósi 108 km. frá Reykjavík. Vinarliga lat okkum hoyra um tit hava áhuga.
Tlf. + fax 00354 4351255,
mobile 8989254

KONA/GENTA
ið ikki roykir søkist at gera reint fyrrapartar.
Tlf. 317470

SMÆRRI TIMBURARBEIÐI
verður gjørt, so sum innrætning av kjallarum og loftum o.a.
Tlf. 251181

SUÐUROYINGAR!
Tænasta innan alt elarbeiði og teldunet.
GK-EL
við Georg Kjærbo,
løggildum el-innleggjara,
tlf. 210608 ella 372608

Barnaútgerð

BARNASTÓLUR TIL SØLU
Sera vælhildin myrkabláur Simo-barnastólur til sølu fyri 2300 kr. Nýprísur 3500 kr.
Tlf. 312890

KLAPPVOGNUR
Robustur klappvognur, sum kann leggjast niður + gráur koyriposi bíliga til sølu.
Tlf. 319806

KLAPPVOGNUR TIL SØLU
Ein klappvognur til sølu fyri 150 kr.
Tlf. 316016 ella 214884

KOYRISTÓLUR
Myrkabláur SIMO koyristólur við koyriposa og regnslag til sølu fyri 3.200 kr.
Tlf. 320211

TIL SØLU
Barnavognur v/ lift og ein Shopper koyristólur, bert brúktur til eitt barn, til sølu samlað fyri 2.000 kr.
Tlf. 281726

TIL SØLU
Babystólur til bil 300 kr.
Babystólur 200 kr.
Tlf. 217946

TIL SØLU
Grulvigarður úr træi til sølu.
Tlf. 316720 - 216720

TIL SØLU
Gangistativ v/ borði og træ borðstólur.
Tlf. 457565

Barnaansing

DAGRØKTARMAMMA SØKIST
til 2 ára gamlan drong at byrja 1. sept. Helst við børnum.
Tlf. 314064 - 26804064 -
35260216

GENTA/KONA
søkist at ansa eftir hálvt ára gomlum drongi í Tórshavn.
Tlf. 441161 / 316563

Bátaútgerð

4-MANNAFAR TIL SØLU
Lítið brúkt 4 ára gamalt 4-mannafar til sølu. Um ynskist kann ein 8-hesta Mariner páhangsmotorur fylgja við.
Tlf. 311558 ella 423243

5-MANNAFAR
til páhangara við húsi til sølu.
Tlf. 455804

BÁTUR TIL SØLU
8-mannafar úr træi við 10-12 HK Sabb motori.
Tlf. 317565 ella 316814

GLASTREVJA JOLLA
17 fót glastrevja jolla v 7,5 HP páhangsmotori í sera góðum standi, til sølu um høskandi boð fæst.
Tlf. 210061

GLASTREVJABÁTUR
Ein 7,8 m. langur COMET glastrevjabátur í sera góðum standi til sølu. Báturin er útgjørdur við m.a. VHF, lit ekkolod, GPS, radara, 36 HK Bukh motori, radara, hydraulikpumpu, kabyss, mastrar, segl og presending (cockpit).
Tlf. 317801

HVALVÍK 800
27 fót glastrevjabøatur, útgjørdur til útróður, við fiskiloyvi, til sølu um høskandi boð fæst.
Tlf. 422462 / 212462

JOLLA
17 fót glastrevja jolla v/ 7,5 HP páhangsmotori í sera góðum standi, til sølu um høskandi boð fæst.
Tlf. 210061

STARLETT
27 fót við 110 HK Volvo motori, gongur 14.N.M.T. míl, er góður útróðrarbátur, til sølu. Prísuppskot 120.000 kr. ella hægstbjóðandi.
Tlf. 361503

TIL SØLU
Spildurnýggj bátaskrúva 19x20 tumma, 4 bløð vinstra til 38 mm aksil. Vegna feilkeyp til sølu fyri kr. 5000 (kostaði 6.719). Passar til Volvo 130 hk., red 1:3
Tlf. 314368

Bingo

BINGO
verður í KFUK mánakvøldið 14. august kl. 19. Drigið verður millum spølini.
KFUK, Varðagøta 9

BINGO
verður í Stórhúshøll leygardagin 19. august.
ÍF (fótbóltur)

FRÁ EYDNUNI
Gott bingo verður sunnudagin 21.8. kl. 16.00. Full pláta 400 kr. Á lutaseðli gávukort á 1000 kr. Eykaspælið 1200 kr. Drigið verður millum spølini.
Eydnan

FRÁ STRÁLUNI
Gott bingo verður á Strondum sunnudagin 13. aug. kl. 16. Burturlutað verður m.a. 2 føroysk krov í heyst. Eisini verða lúkur at lata upp.
Strálan

GOTT BINGO
verður í Eydnuni sunnudagin 13.8. kl. 16, full pláta 400 kr. Á lutaseðli 2 lomb í heyst. Drigið verður millum spølini.
Sunda Róðrarfelag og Flogbóltsfelagið Nøvan

GOTT BINGO
verður í TB-húsinum tórsdagin 17. august kl. 19.00. Høvuðsvinningur á lutaseðli 2x500 kr. Annaðhvørt bingo 300 kr., annaðhvørt hálvt krov. Eykaspæl verður eisini.
Tøroyrar Bóltfelag

SUÐUROYINGAR
Gott bingo verður í Framtíðini onskvøldið 30 august kl. 19.30. Høvuðsvinningur á lutaseðli gávukort á kr. 1000,00. Eisini verður lamb til heystar burturlutað. Annað hvørt bingo gávukort á kr. 300,00 og annað hvørt gávukort á 1/2 krov.
Kirkjukórið Ljómur.

Burturm. / funnið

ADIDAS JAKKI
Ein svartur Adidas jakki við orangelittum strípum og snarlás funnin við grótbrotið nær við campingplássið yviri við Strond.
Ringið 314384

BUNDIN FØROYSK HÚGVA
Hevur nakar í Havn funnið eina gráa bundna húgvu við navninum „Elin Sofía“ so ring!
Tlf. 317376

BURTURMIST
Fóðraður bræbvjálvi burturmistur í Miklagarði ella har um leið. Á honum stendur Svein Bjørn Weber. Í honum er ein snarbundin ljósagrá føroysk troyggja til barn ca 1 ár.
Tlf. 313878

BURTURMIST
Er tað nakar, sum hevur funnið eitt fototól av merkinum Samsung á Ólavsøku. Tað er møguliga burturmist á teininum frá Jóanesargøtu til miðbýin.
Vinarliga ring 315892

BURTURMIST
Belti til føroyska gentubúnan mist ólavsøkuaftan onkustaðni millum Hornabø, niðan Dalavegin, ella niðri í Vágsbotni. Beltaspennið er av slagnum »Smæri«. Um tú hevur funnið beltið, vinarliga ring
Tlf. 312615

BURTURMIST
Minolta myndatól í fototasku burturmist tann 28.7. kl. 16.00 á Kongabrúnni aftan fyri Stefanssonshús. Tú, sum hevur funnið myndatólið, fært 500 kr. í finningarløn.
Tlf. 283600 / 313461

BURTURMIST
Silvurarmband við ravsteini burturmist á ólavsøku hóskvøldið 27. juli. Allarhelst á ólavsøkukonsertini. Um nakar hevur funnið tað ella borið eyga við tað undir konsertini, vinarliga ring
tlf. 312849 ella 215201

BURTURMIST
Eg misti beltið til føroysku klæðini burtur 28. juli, onkustaðni millum Føroya Banka, kommunuskúlagarðin og KFUM millum kl. 21 og 23.30. Um onkur hevur funnið tað, kann tú so seta teg í samband við mammu mína. Finningarløn verður latin. Spennið er knappamynstur.
Heilsan Rebekka M.
321148 - 281032

EIN SVØRT MAPPA
Ein svørt sparikassamappa burturmist á ólavsøku. Um nakar hevur funnið hana, vinarliga ring
tlf. 214260 ella 444264

EITT
lítið Inex gull damuur við rundari skivu burturmist í miðbýnum í Havn tann 27.7.
Vinarliga ring tlf. 315290,
Karin

FRÁ SJÓNLEIKARHÚSINUM
Á ólavsøku hava vit funnið hesar lutir: 1 brillur, 1 lykil, 1 ring, 1 canon etui, 1 koll og ein vest. Lutirnir fáast við at ringja til
tlf. 217510.

FØROYSK HÚGVA
Um onkur hevur funnið eina hondbundra føroyska húgvu í miðbýnum ólavsøkukvøld, vinarliga ring
tlf. 423591

FØROYSK HÚGVA
til smádrong burturmist í miðbýnum á ólavsøku.
Tlf. 320860

HEY
eg eiti Tyrnir og eri 4 ár. Súkkla mín er horvin í Faksagøtu á Norðasta Horni. Hon er hvít og reyð við 2 hjólum + hjálparhjól. Hon eitur »Dalemantiner« og er helst einasta av sínum slag her á landi.
Ringið 319386

HOSUBAND
funnið ólavsøkuaftan. Litur: gult, reyðbrúnt, grønt.
Tlf. 316763

HOSUBAND
Um onkur hevur funnið eitt dreingja hosuband ólavsøkuaftan, vinarliga ring.
Tlf. 310251

HVØR HEVUR
mist ein gentukýsa, hvítan við blomstrum til føroysk klæðir - er funnin í Niels Finsensgøtu.
Ringið 313799

KETTLINGUR
grá, hvít undir búkinum, brún eygu, hvítar labbar, brúnan øs, saknast. 100 kr. til tann, ið finnur hana.
Tlf. 313393
Adr. Billugøta 1

MYNDATÓL
Svart Canon myndatól burturmist á ólavsøku. Møguligur finnari biðist ringja
Tlf. 26174064

SVART HARRAUR
tikið upp á Kongabrúnni á ólavsøku.
Tlf. 314368

SVARTUR FRENSUR
við hvítum beinum og búki og hvítari strípu miðskeiðis á trýninum horvin.
Vinarliga ring 315632

TANN,
sum tók urið hjá einum smádrongi í svimjihylinum tann 3. aug. millum kl. 15-17 biðist leggja tað niðan í móttøkuna í svimjihylinum. Reimin er skorin til drongin. Urið er svart.

Býli

BÝLI Í KBH.
Er tað nakar, ið kann skaffa mær íbúð ella kamar í Keypmannahavn skjótast gjørligt? Alt hevur áhuga, eisini framleiðing í styttri tíðarskeið.
Tlf. 86120203
ella 441384

EINI SUMMARHÚS
til leigu í Skálavík.
Tlf. 361217 eftir kl. 17

FRIÐARLIG
einlig kvinna leitar eftir kamari í Havn. Eg havi onki at búgva í, so vinarliga hugsa um meg.
Tlf. 222324

FRÍTÍÐ Í MIKLADALI
Njótið friðaligt umhvørvi í Mikladali í frítíðarhúsum við øllum hentleikum.
Tlf. 455267
ella 456939

GJÓGV - VIKUSKIFTI/ FERIU
Hevur tú hug at uppliva ta vøkru náttúruna við Gjógv? Vit leiga út eitt sera hugnaligt frítíðarhús við vanligum hentleikum.
Tlf. 423138, 313423,
316505, 284705

GOYMSLUHØLI
v/ lítlari skrivstovu, garaguhurð og parkering til 2-3 bilar ynskist til leigu í Tórshavnar umráðnum.
Tlf. 317865 - 282165

HALLÓ HALLÓ
Er tað nakar, sum hevur eina íbúð í Klaksvík ella har í nánd til eldri par.
Vinarliga ring tlf. 456662

HÚS Á ARGJUM
til leigu frá 1. sept. 2000 til aug. 2000. Húsini eru 140 fermetrar, standa í barnavinarligum umhvørvi og hava gott útsýni.
Tlf. 311057

HÚS Á SANDI
til sølu um høskandi boð fæst. Áhuga kunnu ringja
tlf. 320487

HÚS Í KVÍVÍK
til leigu í vikuskiftinum, allir hentleikar, gott útsýn yvir bygdina.
Tlf. 447031

HÚS Í RUNAVÍK
til sølu. Húsini standa væl fyri, tætt við høvuðsveg, posthús og handlar. Sera gott útsýni. Stødd: tvær hæddir á 115 fermetrar. Alt innrættað. Prísuppskot 1 mió.
Tlf. 447254

HÚS TIL LEIGU
Sethús á Krosli í Vági í 2 hæddum, 106 kvm. í góðum standi, til leigu.
Ringið 373797 ella 0045
86740684

HÚS TIL SØLU
Stór hús í vesturbýnum til sølu um høskandi boð fæst.
Tlf. 320606

Í SANDOYNNA AT FERÐAST!!!
So eru stór og góð hús við øllum hentleikum til leigu í Skopun. Húsini eru vælegnað til bólkar. Nærri frættist á tlf. 361417 ella
361334.

ÍBÚÐ
ynskist til leigu í Keypmannahavn, n ærhendis miðbýnum, í døgunum 17.-27. august.
Tlf. 212146 ella 214043

ÍBÚÐ ELLA HÚS YNSKIST
Vit eru tvær 24 ára gamlar gentur undir útbúgving, sum sóknast eftir íbúð ella húsum til leigu í Havn. Fara væl um og gjalda til tíðina.
Tlf. 222686

ÍBÚÐ Í HAVN TIL LEIGU
frá 9. sept. til einligt tilkomið fólk. Stødd o.u. 50 kvm. atgongd til vaskirúm. Leiga 3.500 kr. um mór. við el og hita.
Bill.mrk. 893456

ÍBÚÐ SØKIST
Par søkir íbúð ella hús í Havn. Hava fast arbeiði.
Tlf. 361435 ella 321064

ÍBÚÐ SØKIST
skjótast gjørligt í Havn ella í Hoyvík. Má hava 2-3 kømur.
Tlf. 316716

ÍBÚÐ SØKIST
Mamma við einum barni søkir eftir íbúð í Havn skjótast gjørligt. Hevur fast arbeiði.
Tlf. 314111
ella 221580

ÍBÚÐ SØKIST
Eg eri 27 ára gamal, havi fast arbeiði og leiti eftir íbúð í Havn fyri max. 4.000 kr. um mór.
Tlf. 220605, e. kl. 13

ÍBÚÐ SØKIST
Tvær 22 ára gamlar gentur søkja íbúð í Havn skjótast tilber.
Tlf. 447794

ÍBÚÐ SØKIST
til unga gentu í neyð. Má liggja í Keypmannahavn ella nærhendis. Alt hevur áhuga.
Ring 0045 22775399,
Svanna

ÍBÚÐ SØKIST
Par søkir eftir íbúð í Havn skjótast gjørligt. Roykja og drekka ikki.
Tlf. 223472

ÍBÚÐ YNSKIST!
Vit eru 2 vinkonur ið sóknast eftir íbúð í Tórshavn skjótast gjørligt. Vit eru friðaligar, fara væl um og gjalda til tíðina.
Tlf. 213859

KAMAR Í KBHVN.
Stórt ljóst kamar við atgongd til køk, bað, etc. í 3 ver. íbúð, til leigu nú. Liggur nær við Øresundskollegiet (centralt á Amager) kr. 2.000 pr. mór.
Ring um kvøldið
tlf. 312529